TRYGGINGARFELAGIÐ LÍV
Postboks 206
Óðinshædd 11
FO-110 Tórshavn
Tel. 31 11 11
liv@liv.fo
www.liv.fo

# Áheitan um LÍVkontu

Fulla navn:

Tryggingar nr.: | P-tal:

Bústaður: | Postnr.: | Býur/Bygd:

Telefon: | Teldupost:

## LÍVkonta

LÍVkonta verður stovnað sum uppsparing við marknaðarrentu. Við marknaðarrentu er avkastið knýtt at gongdini á virðisbrævamarknaðinum og fært tú tann ágóða, sum marknaðurin gevur. Í góðum tíðum fært tú allan ágóðan av góðu gongdini. Møguleiki er tó fyri negativum avkasti í ávísum tíðarskeiðum, tá tað gongur minni væl.

Íløgurnar í samband við LÍVkontu verða gjørdar við lægsta váða.

Til ber at fylgja gongdini á kontuni á kundaportalinum MÍTT LÍV, sum tú finnur á heimasíðu okkara www.liv.fo , innrita verður við Samleikanum.

Við deyða verður, verður tað sum er eftir av uppsparingini útgoldið sambært tilskilan.

Ynskir tú at vita meira um LÍVkontu, ber til at gera tað á heimasíðu okkara www.liv.fo/livkonta.

## Tilskilan

**Útgoldið verður til "næsta avvarðandi" um tú ikki hevur givið okkum boð um annað.**

*Næsti avvarðandi er í fyrsta lagi hjúnafelagin.*
*Er eingin hjúnafelagi, verður útgoldið til børn, íroknað ættleidd børn.*
*Um eingi børn eru, verður útgoldið sambært arvalógini/testamenti.*
*Legg til merkis, at ein møguligur sambúgvi er ikki fevndur av hugtakinum "næsti avvarðandi" í hesum høpi.*

**Er hetta ikki í tráð við títt ynski, er tað lætt og ómakaleyst at broyta tilskilan.**
**Oyðiblaðið, ið tú skalt útfylla og senda okkum finnur tú á heimasíðu okkara www.liv.fo/tilskilan**

## Eg vátti við mínari undirskrift niðanfyri at:

- Samansparda virðið á tryggingini, ið eg havi ásett omanfyri verður flutt á eina LÍVkontu.
- Eg eri kunnað/ur um at uppsparingin verður stovnað við marknaðarrentu, og at tað tí eisini er møguleiki fyri einum negativum avkasti í ávísum tíðarskeiðum.
- At eg sjálv/ur havi vigað mítt ynski og væntan um avkast ímun til váðan fyri tap.
- At eg eri greið/ur yvir at tær forsagnir, ið eg havi fingið, um framtíðargongdina í íløgunum, byggja á greiningar av búskaparligum faktorum, og at forsagnirnar ikki eru nøkur trygd fyri at gongdin verður soleiðis sum forsøgnin sigur. Eg kann tískil ikki gera nakað krav galdandi móti LÍV, um so er at veruliga gongdin verður verri enn forsagnirnar ella mín egna væntan.
- At eg havi fingið útflýggjað eitt avrit av galdandi íløgutreytunum hjá LÍV og at eg við hesum góðtaki íløgutreytirnar

Dagfest

Undirskrift